

www.oljan.fo

**Jan Müller** 31 - 05 - 2013

# Altjóða toppfundur á Svalbard

Norski uttanríkisráðharrin, Esben Barth Eide, hevur í hesi vikuni verið vertur fyri altjóða toppfundi í Ny-Ålesund á Svalbard. Fundurin hevur verið fyri innbodnum gestum ymstaðni frá í heiminum. Hetta eru fólk, sum hava ávirkan innan politikk, gransking og vinnulív. Evnið á fundinum hevur verið veðurlagsbroytingar og hvørja ávirkan hesar hava. Føroyski stjórin í Statoil, Rúni M. Hansen, var ein av luttakarunum og fyrilestrahaldarunum á fundinum. Norskir miðlar gera nógv burtur úr toppfundinum, sum kemur í kjalarvørrinum á stóra áhuganum fyri tí arktiska økinum. Aðrir luttakarar vóru, umframt norska uttanríkisráðharran, varauttanríkisráðharrin í Suður Korea, Tae-yul Cho og kendi indiski granskarin Rayendra Packaeva, sum millum annað er formaður fyri IPCC (The Nobel Peace Price-Winning Intergovernmental Panel on Climate Change). Fundurin varð hildin í Ny-Ålesund á Svalbard, sum er eitt av teimum norðastu samfeløgunum í heiminum. Umframt norskar miðlar vóru eisini umboð frá Reuters, Financial Times, The New York Post og Ecomonist við á fundinum. Mynd: Rúni M. Hansen her saman við norska uttanrikisráðharranum og varauttanríkisráðharranum í Suðukorea á altjóða veðurlagsfundi á Svalbard.